# Nøvn

## Føðingar



*Hey eg eiti Elisa Hentze Niclasen. 31. oktober 2010 kl. 00.02 bleiv eg født á Hvidovre Hospitali, og eg vigaði 2986 gr og var 52 cm long. Mamma og babba eita Rakul Hentze Niclasen og Kristian Niclasen.*



*9. desember fingu Alie og Benjamin Jacobsen, Brentwood Kalifornia, eina dóttur, sum kallast Anna Sofía. Hon vigaði 2800 gr og 47 cm long.*



*Mikudagin 8. desember kl. 9:59 fingu Markus, Heidi og Bjarni Nygaard, Tvøroyri, eina fitta, lítla diddu á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Hon vigaði 3530 gram og var 51 cm long.*

30. november fingu Hannefía og Jens Pauli Joensen, Norðoyri, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3500 gr.

5. desember fingu Eydna Hermannsdóttir og Ronnie Samuelsen, Klaksvík, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3000 gr.

14. desember fingu Tina Jensen og Pauli Tjørnudal, Kolding, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3850 gr.

## Takk

Vit vilja við hesum bera eina hjartans tøkk til øll tykkum, sum mintust meg á 70 ára føðingardegnum, tøkk til tykkum, sum komu inn á gólvið, tøkk fyri blómur, heilsanir og uppringingar. Harrin signi tykkum øll.

Vit vilja eisini ynskja øllum okkara kæru, ætt, vinum og kenningum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýttár, við tøkk fyri brátt farna.

Bestu heilsanir

**Emly og Terje Vestergaard**

## Takk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum gleddu meg á 70 ára føðingardegnum 19. september 2010. Við ynski um eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár.

***Heilsan***

**Sámal E. Debes**
**Oyri**

## Takk

Øllum tykkum, ið gjørdu mær føðingardagin 28. okt. sera hugnaligan, takki eg hjartaliga.

Við ynski um eini gleðilig jól og Harrans signing í komandi ári.

**Heilsan Evelyn**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæri pápi og beiggi

**Poul Beder**
**ættaður út Vági, búsitandi í Havn**

andaðist mikudagin, 48 ára gamal.

Kistan fer frá Landssjúkrahús-kapellinum fríggjadagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin kl. 13.

***Vegna familjuna***

**Rannvá , Rani og Randi**

Tey, ið vilja geva blómur ella krans, kunnu geva børnunum eina peningagávu, konto í Suðuroyar Sparikassa

## TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, sum vístu stuðul og umsorgan í hesi sváru tíð eftir at mamma og omma okkara og kona mín,

**Ella Maria Nilssen Hansen**

alt ov tíðliga varð tikin frá okkum.

Takk til Derhard Jógvanson, prest, takk fyri blómur í kirkjuni, takk fyri peningagávur til Krabbameinsfelagið og takk til øll tykkum, ið hjálptu til við ervinum.

**Familjan**



## TØKK

Hjartaliga tøkk til tykkum mongu, familja, vinir og kenningar, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, stuðlaðu og hjálptu okkum í stóru sorg okkara, tá vit so brádliga mistu elskaða son, beiggja og drong okkara

**Sæbjørn Petersen**
**Skálafirði**

Ein serlig tøkk til Símun P. Jacobsen, prest, fyri góð og troystarrík orð og umsorgan.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, gravara, tykkum, sum lótu bussar, og tykkum, sum fingu ljóð út í bussarnar, og annars øllum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina.
Tøkk fyri blómur og kransar.
Tøkk til tykkum í Kelduni, sum tóku tykkum so væl av ervinum, og tøkk øll somul, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Jonna, Jóan Petur, Elmar, Atli og Mirjam**